# Granskingaretikkur og -reglur

Almenn kunning og vegleiðing í sambandi við umsóknir um stuðul til gransking




Kunningarfundur í Sjóvinnuhúsinum 28. november 2018

granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

# Granskingaretikkur

- Hugtakið granskingaretikkur vísir til eina ørgrynnu av virðum, normum og stovnsskipanum, sum samvirka til at skapa og skipa vísindaligt virksemi. Granskingaretikkur er ein samandráttur ella skipan av praktiskum vísindamorali. Granskingaretiskar leiðreglur eru ítøkiliggering av grundleggjandi virðum og normum hjá granskingarumhvørvinum. Tær stava frá vísindaligum almenmorali, eins og almennur etikkur stavar frá almenmorali samfelagsins.
- Granskingaretisku leiðreglurnar snúgva seg í høvuðsheitum um gransking, men eru eisini galdandi fyri annað granskingargrundað virksemi sum undirvísing, miðling av gransking, serfrøðingavirksemi og stovnsfyrisiting. Hugtakið gransking fevnir her eisini um arbeiðið hjá studentum og granskaralesandi á øllum stigum, og stovnarnir hava ábyrgd av at geva viðkomandi upplæring í granskingaretikki. Leiðreglurnar galda eisini alla gransking í almennum og privatum høpi, tað verið seg grundgransking, nyttugranskning ella avtalugranskning.

# Etiskar leiðreglur ≠ lógir og kunngerðir

- Granskingaretiskar leiðreglur hava ikki sama leiklut ella funktión sum lógir og kunngerðir.
- Leiðreglurnar eru fyrst og fremst ráðgevandi, vegleiðandi og fyribyrgjandi - tær eru hjálparamboð hjá granskaranum og granskingarumhvørvinum
- Tær vísa á viðurskifti, sum granskarin eigur at hava í huga, men hesi mugu oftast vigast upp móti hvørjum øðrum og móti øðrum krøvum og skyldum.
- Lógir og kunngerðir verja ítøkiliga einstaklingar og bólkar og kunnu áleggja revsing ella sanktiónir í sambandi við brot.

# Hví hava vit leiðreglur

- Endamálið við granskingaretiskum leiðreglum er at geva granskarum og granskingarumhvørvinum vitan um viðurkendar granskingaretiskar normar. Leiðreglurnar eru ráðgevandi og vegleiðandi, og tær skulu hjálpa við at menna granskingaretiskar metingar og refleksion, avklára etiskar tvístøður og menna góða vísindaliga siðvenju. Tær skulu eisini hjálpa við at fyribyrgja vísindaligari óreiðiligheit. Tær kunnu vera til hjálpar í ítøkiligum málum, í fyrireiking av eini granskingarverkætlan og í almannakunnger av fundum og úrslitum.
- Granskingaretisku leiðreglurnar eru bindandi bæði fyri einstaklingar og stovnar. Bæði granskarar og granskingarstovnar hava sjálsvstøðuga ábyrgd av at tryggja at granskingin, sum tey fremja, er góð og ábyrgdarfull. Tað er týdningarmikið at stovnarnir greina sínar leiklutir og ábyrgd í sambandi við granskingaretikk á øllum stigum. Stovnar mugu hava mannagongdir fyri fígging, umsiting og stýring, sum tryggjar, at granskingin er framd í samsvari við granskingaretiskar normar og leiðreglur.

# Granskingaretisk prinsipp

- **Virðing**
  - Personar, sum luttaka í gransking sum informantar ella á annan hátt, skulu viðgerast við virðing.
- **Góðar avleiðingar**
  - Sum granskari skal ein stremba eftir at, virksemið hevur góðar avleiðingar og at óhepnar avleiðingar eru rímuligar.
- **Rættvísi**
  - Ein og hvør granskingarverkætlan skal vera rættvíst skipað og framd.
- **Integritetur**
  - Granskarin bindur seg til at fylgja viðurkendum leiðreglum og at virka ábyrgdarfult, opið og erliga yvirfyri starvsfeløgum og almenningi.

# Nøkur kjarnuhugtøk og val

- Val av granskingarobjektum – veikir bólkar mugu bert brúkast, um tað eru teirra kor, sum skulu kannast (børn, sjúk, sosialt útsett) og um teirra nyttuvirðið er týðiligt
- Kunningarskylda
- Sjálvboðið, kunnað og ítøkiligt samtykki
- Meting av nyttu og vágum
- Trúnaður, anonymisering, pseudonymisering og fráboðanarskylda
- (Endur)nýtsla av tilfari – krevur loyvi
- Goymsla av datum, trygd og longd ≠ open data?
- *Opinleiki*
- *Samútgávur – viðhøvundar*
- *Góður ávísingarsiður*
- *Gegni*

# Krøv til umsøkjarar

- Kunna seg við almennar granskingaretiskar leiðreglur – viðmæla etikkom.no.
- Spyrja seg fyri á stovninum/virkinum, um tað eru serligar reglur galdandi
- Skriva eitt brot í umsóknini um etisku spurningarnar, sum eru viðkomandi í sambandi við ítøkiligu umsóknina – visa at umsøkjarin hevur innlit í ymsu avbjóðingarnar
- Staðfesta um fráboðan til/undangóðkenning krevst frá Dátueftirlitinum og/ella Vísindasiðsemisnevndini.
  - Um nei, skriva hví hetta ikki er neyðugt.
  - Um ja, lýs stutt ætlan fyri, nær fráboðan/søkt verður um loyvi ella legg loyvi við.
- Um viðkomandi, leggja við (kladdur til) spurnarbløð og váttan um sjálvboðið og kunnað samtykki

# Ábyrgd hjá stovnum og stovnsleiðslum

- Stovnurin er høvuðsumsøkjari, samábyrgd av allari verkætlanini
- Hevur skyldu og royndirnar at læra og vegleiða granskarunum
- Skal kunna umsøkjara um serligar reglur á stovninum
- Skal vísa til person, sum kann hjálpa við etiskum spurningum
- Skal tryggja granskingarfrælsið hjá granskaranum í sambandi við val av evni, metodu, fremjan av granskingini og almannakunger av úrslitum,
- Skal hjálpa granskaranum at handfara og goyma dátur og í sambandi við vísindaligar útgávur
- Skal hava eftirlit við, at granskarin virkar sambært góðum granskingarsiði og skal hava skipanir, sum verða settar í verk, um illgruni er um brot á granskingaretiskar normar

# Altjóða reglur og viðmæli

- Nürnbergkodeksið 1947
- Helsinkideklaratiónin 1964 - heilsuøkið
- Belmontrapportin 1974 - heilsuøkið
- Oviedokonventiónin 1997 - heilsuøkið
- Vancouveranbefaligarnar – heilsuøkið – um publisering
- Nagoya-protokollin 2010
- IKOM 1986 - søvn

- Uppsalakodeksen 1984
- Singapore Statement on Research Integrity 2010
- Generelle forskningsetiske retningslinjer 2014
- Den danske kodeks for integritet i forskningen 2015

granskingarráðið RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

# Føroyskt lógarverk

- Grundlógin
- Mannarætindasáttmálin
- Persónsupplýsingarlógin
- Vísindasiðsemislógin
- Ílegulógin
- Heilsulógin
- Lóg um upphavsrætt
- Seturslógin - granskingarfrælsi
- Djóraverndarlógin
- *(Náttúrumargfeldislógin)*

granskingarráðið RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

# Keldur

- Gransking.fo
- Etikkom.no
- Forskerportalen.dk
- CODEX - regler och riktlinjer för forskning
- H2020 Online manual Ethics

granskingarráðið

RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

# Kjak

- Hvørjar royndir hevur tú – góðar og ringar
- Hvussu kunnu vit sum myndugleikar kunna betri
- Hvat hevur tú brúk fyri sum umsøkjari ella sum stovnsumboð